tíðindablaðið sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Níclas Johannesen
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Tjóðveldið komið í óføri

## *Oddagrein*

Tað tykist sum at Tjóðveldisflokkurin kemur sær alt longur út í óføri. Eitt er, at hann í hesum landsstýrisskeiði hevur slept flest øllum hugsjónum, tá tað snýr seg um vanligan sosial- og arbeiðarapolitikk. Eitt annað er, at hann nú er komin út í eitt "forklláringsproblem" so tað forslær. Bæði í samband við Vágatunnilin og oljuútgerðarhavnina.

Hóast Tjóðveldisflokkurin eigur formannin í Vinnunevndini, sum brúkti óvanliga langa tið at viðgera bæði málið um fyrsta útbjóðingarumfar og Vágatunnilin, so gluppu bæði málini av hondum. Men sambært Hergeiri Nielsen hevur Javnaðarflokkurin skyldina, at oljuútgerðarhavnin ikki endaði í Suðuroy, og sambært Heina O. Heinesen gjørdi Javnaðarflokkurin ikki nóg mikið til at fáa eina aðra loysn í málinum um P.f. Vágatunnilin.

Hinvegin stendur rimmarfast, at í Vinnunevndini tóku bæði Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin undir við tí, sum Heini O. Heinesen ferð eftir ferð nevndi í fjølmiðlum, nevniliga at Landsverkfrøðingurin skuldi standa fyri arbeiðnum og ikki eitt partafelag. Men hvat hendi? Bukaði ein samgongufundur Tjóðveldisflokkin upp á pláss? Í øllum førum endaði tað við, at Tjóðveldisflokkurin tók undir við einum neyðuppskoti hjá Sambandsflokkinum, so Landsverkfrøðingurin hóast alt fekk ein fingur - hóast lítlan - við í spælið.

Spældi Tjóðveldisflokkurin kortini rætt, kundi hann verið við til at útvega Landsverkfrøðinginum ein størri leiklut. Og í hesum máli skuldi ikki verið nakar trupulleiki at fingið allan Tjóðveldisflokkin við. Vit hava jú sæð, hvussu Finnur Helmsdal hevur roynt at verja henda stovn og pilka við óhugnaliga mannagongdina, tá Henning Jacobsen varð offraður. Men eftir hesa avgerðina ber til at seta spurnartekin við, um leikur Tjóðvelisins bara hevur verið leikur fyri gallarínum. Men tað mest kostiliga var kortini, at eftir at Heini O. Heinesen boðaði frá, at tað var eydnast at fáa Vinnunevndina samda um álitið, atkvøddi hann sjálvur ímóti uppskotinum um vágatunnilin!!!

Í málinum um útgerðarhavn í Suðuroynni stendur eisini rimmarfast, at tað var Hergeir Nielsen, sum fyrstur var at boða Suðuroyar oljuvinnuráð, at Tjóðveldisflokkurin var samdur um at leggja eina oljuútgerðarhavn í Suðuroynni. Nú sigur hann, at hann hevur gjørt eitt mistak, og tað er alla æru vert, men síðani at leggja skyldina yvir á aðrar - t.d. Javaðarflokkin - vísir bara, at maðurin hevur rent seg í ein trupulleika og hevur eitt álvarsamt forklláringsproblem.

Eisini í hesum máli undrar tað, at Tjóðveldisflokkurin hvørki tekur undir við prinsippinum, at tað er politiska valdið, sum skal siga, hvar ein oljuútgerðarhavn møguliga skal liggja, og ikki privatu marknaðarkreftirnar, ella at føroyingar í lógini vilja taka hædd fyri, at føroyingar kanska seinri stovna eitt alment føroyskt oljufelag. Men langt út í bakborð leggur Tjóðveldisflokkurin seg fyri at royna at halda fast um fullveldisætlanina, sum Fólkaflokkurin roynir at forkoma.

***Sosialurin***

## Viðmerkingar:

# Suðuroyar Tjóðveldisfelag stuðlar Hergeiri

Suðuroyar Tjóðveldisfelag skal hervið boða frá, at vit taka fult undir við tí samgongu sum situr í løtuni.

At tað ikki altíð gongur einum eftir vild, má ein liva við, tá tað eru so ymiskir flokkar, sum mynda landsstýri í tí nakað alternativ til hesa samgongu finnist ikki.

Á fundi um vikuskiftið við umboð okkara á tingi, hava vit fingið ábendingar um, at tey mál og viðgerðin av teimum, sum vit hava verið ónøgd við, innihalda nógv sjónarmið, sum almenningurin ikki er kunnaður um, men tað ber alt á rætta borðið. og hetta hevur felagið sligið seg til tols við fyribils.

Eisini skulu vit gera vart við, at Suðuroyar Tjóðveldisfelag einki hevur at finnast at umboði okkara á tingi ella tí arbeiði, hann ger.

**Suðuroyar Tjóðveldisfelag**
**Kaj Vágfjall, formaður**

# Besta virki í Eysturoynni

Vikuskiftið 19. - 20. februar skipar Áhugafelagið Fløtugerð, sum er stuðulsfelag hjá Ítróttarfelag Fuglafjarðar, fyri firmakapping í Ítróttarhøllini á Kambsdali. Kappingin er fyri virkir í Eysturoynni.

Tað munnu vera mong ár síðan seinast, at firmakapping hevur verið fyri virki í Eysturoynni. Ein orsøk man hava verið, at vánaligu tíðirnar høvdu við sær, at ikki serliga mong virki vóru í oynni, og harvið vóru fyritreytirnar fyri eini stórari og spennandi kapping heldur ikki til staðar. Men seinnu árini eru fleiri og fleiri virki komin, samstundis, sum tey, sum kláraðu ringastu skerini, gerast størri.

- Tí verður mett, at grundarlagið fyri at fyriskipa firmakapping í Eysturoynni beint nú er so gott sum tað óivað einaferð kann verða. Og vónandi verða tað fleiri av mongu virkjunum í oynni, sum fara at vísa tiltakinum áhuga, og fara at meldað eitt ella fleiri lið til kappingina.

Leikt verður við 5 monnum á hvørjum liði, og harav skal minst ein verða frammanfyri miðjuna meðan leikt verður. Loyvt er at hava í mesta lagi ein útskiftisleikara. Leikt verður við hondbóltsmálum. Aftasti maðurin hevur ikki loyvi til at bjarga ella taka bóltin við hondunum. Aldursmarkið fyri at luttaka er 16 ár.

Eitt, sum er vert at leggja til merkis, er, at hvørt liðið kann, í mesta lagi, hava ein leikara, sum hevur leikt við 1., 2., 3. deild og/ella unglingum. Hesar treytir skulu fylgjast, og verður lið, sum ikki líkur hesar treytir, noktað luttøku ella eisini tveitt úr kappingini.

Heiðursmerki og steyp verður latið vinnandi liðnum, meðan nr. 2 og 3 fáa heiðursmerki.

Kostnaðurin fyri at luttaka er kr. 400,00 fyri hvørt liðið Tað ræður um at bera skjótt at, tí tað er avmarkað tilmelding til kappingina. Tilmeldingin, sum fer fram á tel. 44 41 74 ella 44 42 15, skal gerast áðrenn týsdagin 15. februar.

So spennandi verður, hvat virki í Eysturoynni hevur bestu fótbólsligu dygdirnar, og kann kjósa seg sum besta virki í Eysturoynni. Svarið upp á hendan spurning fæst ikki fyrrenn sunnudagin 20. februar í ítróttarhøllini á Kambsdali, tá firmakappingin er liðug. Til ta tíð.

- Meldið lið til, bíðið, og verið so við í spennandi kappingini um at gerast ársins virki í Eysturoynni!!!!

**Vinarliga**
**f. Áhugafelagið Fløtugerð**
**Anna Larsen**
**Tel. 444174**

# Góðtaka ikki, at Føroya Lívstrygging verður alment partafelag

*Almennu fakfeløgini góðtaka ikki, at Føroya Lívstrygging er gjørt til eitt alment partafelag*

Stór ónøgd er millum limirnar í teimum almennu fakfeløgunum, nú Føroya Lívstrygging er gjørt til alment partafelag.

Fakfeløgini, sum hava sáttmála við Lívstrygging vegna limir sínar, sum eiga umleið 80% av inngjøldunum/kapitalinum, eru hvørki eftirspurd, hoyrd ella hava verið við í viðgerðini, áðrenn lógin um umskipan av Føroya lívstrygging v arð løgd fyri løgtingið.

Eftir at løgtingið hevur umskipað Føroya Lívstrygging til eitt alment partafelag undir vinnumálastýrinum, umhugsa tey stóru fakfeløgini, sum hava sáttmála við Føroya Lívstrygging, at kanna aðrar møguleikar fyri at plasera eftirlønaruppsparingina hjá limum sínum.

Fakfeløgini eru sannført um, at Føroya Lívstrygging dr ein sjálvsognarstovnur, sum tryggingartakararnir eiga - og er hetta eisini í samsvar við tað, sum Føroya Lívstrygging hevur framført øll árini yvir fyri fakfeløgunum, tá hesi hava gjørt sáttmála vegna limir sínar. Tað er beinleiðis ræðandi, at arbeðsgevarin - her landsstýrið - nú tekur sær ræði á eftirlønaruppsparing limanna.

Aftan á fleiri fundir eru fakfeløgini samd um at kanna øll viðurskifti til botns, og síðan kalla øll fakfeløgini, sum hava sáttmála við Føroya Lívstrygging, innaftur til at taka avgerð um, hvat víðari skal henda í málinum.

# Tøkk

Hjartans tøkk til tykkum øll, sum sýndu samkenslu, táið kæri maður, faðir, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**JÁKUP OLUF Á LAKJUNI**

doyði og varð jarðaður.

Eina serstaka tøkk til tykkum, sum vóru so nógv um hann ta tíðina,ið hann lá heima. Eisini takk til starvsfólk á Landssjúkrahúsinum.

Takk til tykkum mongu, ið fylgdu honum til gravar. Takk fyri blómur, kransar, brøv og uppringingar. Takk eisini fyri peningagávur til »Hjálp til Eystureuropa.«

*Familjunnar vegna*

**Mia**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálptu til, tá góði pápi, verfaðir og abbi okkara

**KJARTAN JENSEN**
á Sandi

andaðist og varð jarðaður.

Takk fyri kransar, blómur, brøv og til tykkum øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*

**Fridrikka og Atli**



# SEV-stýrið steðgað útbjóðing

*Stýrið fyri elfelagið SEV hevur biðið stjóran steðga útbjóðingini av einum nýggjum motori fyri umleið 30 milliónir krónur*

*Klæmint Weihe, stjóri á SEV, hevur fingið boð um at steðga útbjóðingini av einum nýggjum motori fyri umleið 30 milliónir krónur. Hann hevur ongar viðmerkingar til málið*

EYÐUN KLAKSTEIN

Á fundi fríggjadagin samdist SEV-stýrið um at biðja stjóran um at steðga útbjóðingina av einum nýggjum motori fyri umleið 30 milliónir krónur.

Klæmint Weihe hevði sent útbjóðingartilfar út til fýra útvaldar veitarar, men nú hevur stýrið lagt upp í.

– Vit hava biðið stjóran um at steðga málinum, so vit fáa betri tíð at viðgera tað og møguliga lata aðrar veitarar sleppa at bjóða eisini, sigur Poul Arni Jacobsen, formaður í stýrinum.

– Tað eru nýggjar upplýsingar komnar fram sum gera, at møguliga er tað áhugavert at lata aðrar enn teir fýra sleppa at bjóða. Tað skal stýrið nú meta um.

Teir fýra veitararnir, sum høvdu fingið freist til 15. februar at lata tilboð upp á motorin, hava nú fingið boð um, at útbjóðingin er steðgað. Men formaðurin í stýrinum sigur, at teir sleppa við aftur, tá útbjóðingin verður gjørd av nýggjum.

### Útbjóðingartilfarið kanska broytast

*Er hetta ikki at taka stjóran á ræði?*

– Nei, tað haldi eg ikki. Stýrið verður noytt at reagera uppá nýggjar upplýsingar í einum slíkum máli, heldur Poul Arni Jacobsen.

Sambært okkara keldum hevur ivi verið sáddur um útbjóðingartilfarið, og tað kann koma uppá tal, at nýtt útbjóðingartilfar skal gerast.

– Stjórin hevur saman við sínum ráðgevum gjørt útbjóðingartilfarið, og tað kundi ikki verið gjørt betri ella øðrvísi tá. Men eftir at vit hava fingið nýggjar upplýsingar, skulu vit eisini avgera, um nýtt útbjóðingartilfar skal gerast, sigur Poul Arni Jacobsen, formaður fyri SEV-stýrið.

Hann vil ikki siga, hvørjar hesar nýggju upplýsingarnar eru, men hann noktar ikki fyri, at tað kann verða onkur veitari, sum ikki slapp við í fyrstu útbjóðingina, sum nú vil sleppa við og kann koma við einum góðum tilboði.

### Ikki kunnað nóg væl

Málið snýr seg um ein nýggjan motor, sum skal keypast fyri annan av teimum stóru motorunum á elverkinum á Sundi. Motorurin á Sundi hevur ikki verið brúktur, síðan ólag kom á hann fyri nøkrum árum síðani.

SEV hevur klárað seg uttan hendan motorin síðani, men Umboðsnevndin hjá SEV hevur samtykt, at nýggjur motorur keypast, og í ár eru 10 milliónir avsettar til keypið.

Formaðurin fyri Umboðsnevndina, Hans Tausen Olsen, sum er eygleiðari á øllum fundum hjá stýrinum, ynskti at fáa fund um útbjóðingina, og fríggjadagin samdist stýrið um at steðga málinum.

Onkur limur í stýrinum sigur seg einki kenna til, at útbjóðingin skuldi verið gjørd, meðan formaðurin fyri stýrið sigur seg hava fingið neyðugu upplýsingarnar.

– Eg havi verið væl kunnaður um útbjóðingina, og eg havi eisini kunnað stýrið um málið. Spurningurin er so, um tann kunningin hevur verið nóg góð, sigur Poul Arni Jacobsen.

Sambært viðtøkunum fyri SEV er tað stýrið, sum »undir ábyrgd fyri umboðsnevndini skipar fyri felagnum og valdar ognum tess, herundir at keypa, selja og veðseta føstu ognir felagsins.«

Klæmint Weihe, stjóri á SEV, og Hans Tausen Olsen, formaður fyri Umboðsnevndina, vilja ikki gera viðmerkingar til málið.

## SEV

**Umboðsnevnd**
*Hans Tausen Olsen, Runavík, form.*
75 nevndarlimir. Hvør kommuna hevur ein lim fyri hvørji byrjað 1000 av íbúgvaratalinum. Hægsta vald í elfelagnum hevur umboðsnevndin.

**Stýrið**
*Poul Arni Jacobsen, Sørvágur, form.*
7 nevndarlimir, sum umboðsnevndin velir. Stýrið hevur yvirstjórn í viðurskiftum hjá felagnum

**Stjórin**
*Klæmint Weihe*
Dagligu fyristøðuna av SEV hevur stjórin

*Tróndur Djurhuus, sjónvarpsstjóri hevði í gjár ta tungu uppgávu at siga fimta hvørjum starvsfólki í SvF úr starvi*

# 10 fólk sigast úr starvi hjá Sjónvarpi Føroya

*Umleið fimta hvørt starvsfólk í Sjónvarpi Føroya fekk í gjár tey tungu boðini, at verða søgd úr starvi. Sjónvarpið hevur leingi verið í fíggjarligum trupulleikum, og nú tá ein millión skal sparast, hevur leiðslan gjørt av at siga umleið tíggju fólkum úr starvi*

EIRIKUR LINDENSKOV

Sjónvarp Føroya skal spara eina millión krónur. Hetta fórdi í gjár til, at eini 10 fólk vórðu søgd úr starvi í Sjónvarpi Føroya.

Tað hevur leingi verið kent, at sjónvarpið hevur verið í fíggjarligum trupulleikum.

Í 1998 hevði sjónvarpið eitt rakstrarhall upp á 2,4 millónir krónur, og í fjør restaðu 1,6 millióndir krónur í til lønir.

### Slapp ikki at taka rakstrarlán

Fyri at loysa henda trupulleika ætlaði sjónvarpið at taka eitt rakstrarlán, men leiðslan fekk at vita frá undirvísingar- og mentamálastýrinum, at hetta hevði sjónvarpið ikki heimild til.

Tá sjónvarpið heldur ikki fekk játtaða eina eykajáttan á løgtingsfíggjarlógini, vóru góð ráð dýr.

Signar á Brúnni, landsstýrismaður í mentamálum fekk kortini útvegað pengarnar onkursvegna, og tískil hóraði sjónvarpið víðari.

Men nú er aftur galið, og fyri at spara eina millión, verða tí starvsfólk søgd úr starvi.

### 20% av starvsfólkunum søgd úr starvi

Í Sjónvarpi Føroya starvast 52 fólk, so talan er um hópuppsagnir.

Verður talan um 10 starvsfólk, so verða um 20% av starvsfólkunum í Sjónvarpi Føroya søgd úr starvi.

Tróndur Djurhuus, sjónvarpsstjóri vil ikki gera viðmerkingar til málið enn, men úr sjónvarpinum verður váttað, at tey eru í ferð við at gera broytingar í sjónvarpinum, sum tey málbera seg.

Sosialurin skilir kortini, at nøvn eru sett á uppsøgnirnar - og á middegi í gjár høvdu onkur teirra fingið tað at vita.

Sum Sosialurin skilir støðuna, verður ikki talan um at leggja niður ávíst virksemi hjá stovninum, men fólk verða søgd upp á ymsu deildunum.